## Saviola gevst í Barcelona

Javier Saviola heldur ikki fram í spanska stórfelagnum eftir hetta kappingarárið, sum endar um góðar tríggjar vikur. Kviki argentiski áleyparin hevur ikki fingið nógva leiktíð í FC Barcelona í ár, og hann verður nú biðin um at finna sær nýtt felag til komandi kappingarár. Hann hevur tvey tey undanfarnu kappingarárini verið útleigaður til Monaco og síðan Sevilla, men tað tykist greitt, at talan hesaferð verður um eina sølu. Real Madrid og Manchester City sigast bæði hava áhuga í 25 ára gamla áleyparanum.



## U-21 liðið á vøllin

Føroyska U21-landsliðið skal fyri fyrstu ferð í altjóða dyst, tá teir í morgin skulu spæla móti Kroatia. Fyrrakvøldið kom føroyska ferðalagið til Zagreb, og síðani hava spælararnir fyrireikað seg til stóru avbjóðingina. Venjarar hjá liðnum eru Bill McLeod Jacobsen og Heðin Askham, og teir siga, at veðrið ikki er heilt so heitt, sum vandi var fyri. Hesar báðar seinastu dagarnar hava hitastigini verið eini 15-20 í tali. Fyrr í vikuni hava tey annars verið 35. Men lætt verður tað tó ikki móti Kroatia, sum verður mett at hava eitt av sterkastu U21-landsliðunum í Europa.

# ð er valið ikki so torført



*Nógv bendir á, at Christian Lamhauge Holst hesa ferð fær møguleikan frá fyrsta bríksli. Nakað sum hann ikki hevur roynt í landsliðshøpi áður. Fróði Benjaminsen er leikbannaður*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

verður á miðvøllinum, og tí verður Atli Danielsen, sum ofta tey seinastu árini, á bakkinum í høgru.

Marni Djurhuus hevur seinastu ferðirnar verið royndur á vinstra bakki, sum tað hevur verið ivamál um, síðani avloysarin hjá Øssuri Hansen, Súni Olsen, varð fluttur fram á miðvøllin. Landsliðsvenjarin hevur onkra ferðina meiri enn spælt við møguleikan at flyta Christian Høgna Jacobsen aftur á bakkin. Hetta hevur hann ikki roynt seinastu ferðir-nar, og tað er neyvan heppið at fara undir nýggja roynd, tá ið Italia er mótstøðuliðið.

### Miðvøllur og álop

50 dystar maðurin Jákup á Borg er sjálvskrivaður á miðvallarplássi í høgru. Símun Samuelsen hevur fleiri ferðir fingið møguleikan í vinstru. Ímóti Ukraina á heimavølli í mars varð hann skiftur út við Christian Lamhauge Holst miðskeiðis í 2. hálvleiki, og á útivølli í Georgia varð hann bara á vøllinum í yvirtíðini. Símun hevur staðið seg væl í fyrstu umførunum í íslendsku kappingini. Hóast hann higartil í landskappingini ikki hevur verið so sannførandi í HB, sum hann var tað í NSÍ í fjør, so liggur tað til, at Christian Høgni Jacobsen hesa ferð verður ytstur í vinstru.

Fróði Benjaminsen er leikbannaður. Mikkjal Thomassen tykist upplagdur til annað sentrala miðvallarplássið. Súni Olsen er ikki í optimalari dystarvenjing, men hann verður torførur at sleppa uttanum. Ein møguleiki er, at Atli Danielsen kann verða sentralur miðvallari, og at Súni Olsen – orsaka av ikki optimalari dystarvenjing – verður bakkur í høgru. Tað plássið hevur Súni ofta røkt í AaB.

Rógvi Jacobsen eigur heilt víst pláss millum teir fyrstu ellivu. Ivaleyst verður tað sum næstfremsti maður. Andrew av Fløtum er møguleiki í fremstu ódnini. Men meiri sannlíkt er tað, at Christian Lamhauge Holst, ið er liðformaður og lyklaspælari í Lyngby, sum er á veg upp í superliguna, verður fremstur. Christian hevur verið serliga væl upplagdur í vár, meðan Andrew ikki hevur átt fast pláss á liðnum hjá Fremad Amager.

Teir tríggir, sum í kvøld fara at fáa boð frá venjaranum um, at tað ikki er pláss fyri teimum, verða eftir hesum at døma Mortan úr Hørg, Símun Samuelsen og Andrew av Fløtum.

Teir ellivu, sum ivaleyst fara at ganga inn á vøllin saman við italsku heimsmeistarunum í annaðkvøld, verða Jákup Mikkelsen – Atli Danielsen, Jón Rói Jacobsen, Óli Johannesen, Marni Djurhuus – Jákup á Borg, Mikkjal Thomassen, Súni Olsen, Christian Høgni Jacobsen – Rógvi Jacobsen - Christian Lamhauge Holst.

Á beinkinum saman við teimum trimum omanfyri nevndu og klárir at taka av møguleikanum, um hann fer at vísa seg, fara at sita Meinhard Joensen, Rasmus Nolsøe, Kári Nielsen, Pauli G. Hansen, Hjalgrím Elttør og Bergur Midjord. Tveir av hesum skulu tó sáldast frá, áðrenn dómaraseðilin verður skrivaður.